tíðindablaðið sosialurin
Argjavegur 26
Postsmoga 76,
3800 Tórshavn
telefon 11820
Útgevari: p/f sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritakarstjóri: Krisjan Dahl
Blaðkvinnur: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen og Jóhann Mortensen
Uppsetning: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Alternativ uttanfyrivara

NÓGV í [illegible] landi vóru fegin um hina [illegible] samgonguna, og ikki færri [illegible] rættiliga væl nøgd, tí yvirhøvur gekk tað hampiliga væl í øllum samfelagsins liðum.

ARBEIDI[illegible]VAR til allar hendur, sosialmál[illegible] vóru í góðum hondum, [illegible]ini høvdu fiskileiðir alt árið. [illegible]apurin var í stúttari og sunn[illegible]anning, vit skyldaðu ikki m[illegible] at vit til eina og hvørja t[illegible]ráðu hvørjum sítt. Politiska [illegible] varð tikið í størsta [illegible] og roynt varð alla tíðina e[illegible] loysnir og útvegir fyri tei[illegible]rupulleikum, sum stungu[illegible]

MEN IK[illegible]ri nøgd, tað vil so vera, og [illegible]da misnøgd mest at finna [illegible]staðuni hjá Paula Ellefsen [illegible]mari Kass, ið gjørdust [illegible]va desperatir yvir at vera t[illegible]rkan.

EISINI [illegible]mgonguni vóru misnøgdi[illegible]tir. Hesar kreftir vóru um[illegible]ar av blaðstjóra Dagbløð[illegible] av fráfarna formanni[illegible]noksins og teirra fylgisney[illegible]t um landið. Tað, sum he[illegible] mianøgdir um, var, at f[illegible]urin ikki helt seg til sa[illegible] í staðin fyri javnaðar[illegible] og tjóðveldið. Óttin fy[illegible]v framskygdum og dyn[illegible]politikki paraði seg við[illegible]dina við tey sosialu fr[illegible].

HØGRA[illegible]VAR fóru til verka.

TEIMU[illegible] ikki viðhalds-fólk. Tv[illegible]ótu klárir úti í teimum[illegible]laiktjøldunum, og te[illegible] Ellefsen og Hilmar[illegible]ar drivin av einum[illegible]kligum hatri til javna[illegible]g serstakliga hans[illegible]hin drivin av ómet[illegible]ymd.

oddagrein

HENDA NOSSLIGA teggja fann skjótt saman. Samgonguslit og borgarligt alternativ var úrslitið.

SÍÐAN — AFTAN á fyrsta sigursrúsin komu gerandisdagurin og trupulleikarnir.

HÓAST BESTU fiskiár í manns minni, hava Føroyar ongantíð havt so stórar búskaparligar trupulleikar sum hesi fýra árini, og teir eru komnir við og av borgarliga politikkinum!

TÁ TRUPULLEIKAR taka seg upp og hótta allan samfelagsbúskapin, skuldi ein trúð, at teir ráðandi royndu at greiða hesar trupulleikar á ein ella annan hátt. Men so er ikki við teimum trimum flokkum, sum her ráða fyri borgum. Alt fær loyvi at passa seg sjálvt, alt flýtur, eingi móttiltøk verða gjørd. Tað verður snøggt sagt ikki gjørd ein tann einasta roynd til tess at venda gongdini. Tað einasta initiativ hesir borgarligu valdsharrar eru førir fyri at sýna, er, tá vinir og kenningar skulu lívgast!

MEN ANNARS valdar líkasæla, atgerðarloysi og tað sum mest ger almenningin bilsnan: tað verður gjørt gjøldur burtur úr trupulleikunum. Alt verður sligið upp í glens og skemt: uttanlandaskuldin upp á tríggjar milliardir, skattatrýstið, inflatiónin og vinnulívstrupulleikarnir.

OG HETTA er kanska tað mest álvarsama av øllum: hetta at yvirhøvur einki álvara er í hesum borgarliga alternativi.

PRÍSIN FYRI hetta tørvandi álvarsemi gjalda tey ungu, tey gomlu, lág- og miðalinntøkurnar og øll tey, sum ikki hoyra til bólkin »Vinir og kenningar«!

Gløggi og avdúkandi borgarskapsungdómurin, tillukku!

Mangur mundi smírast, tá hann hoyrdi yvirlýsingina hjá afturhaldsungdóminum, sum undir heitinum konservativir hevur hildið ráðstevnu í Føroyum.

Eg kann ikki lata vera við at ynskja tykkum konservativu — ella høgrasinnaðu — tillukku.

Fyrst við limaskapinum í norðurlendska sambandinum av konservativum. Tað er gleðiligt, at tað ikki bert er Sosialistiskt Ungmannafelag, SU, ið hevur leitað út um eingjargarðarnar, og fingið **sjálvstøðuga** umboðan í norðurlendskum politiskum felagsskapi fyri mongum árum síðani.

Harnæst við yvirlýsingini um Sakarhov. Hana taka øll demokratiskt sinnað undir við. Men samstundis vísir hon, hvussu heilt ólukksáliga óvaknir og óærligir tit eru. Fara heilt til Sovjet at finna eitt evnið til eina yvirlýsing!!!

Hví halda tit tykkum ikki innan fyri norðurlendsku landamarkini, tí har eru hópin av aktuellum brekum. Tað mátti verið so líka til, tí konservativar afturhaldskreftir siga jú við stjórnarvaldið í Danmark, Noregi og í Íslandi — og í Føroyum.

Tit umboða jú ungdómin — ella ein part av honum — og bara í Danmark ganga eini 100.000 ung arbeiðsleys. Og hetta talið veksur bert fram undir afturhaldsstýri ideologiska talsmanni tykkara! Tað er kanska ikki nakað problem fyri slips-klædda borgarskapsungdómin???

Hvat við íbúðarneyðini, vantandi útbúgvingarmøguleikunum og praktikkplássunum, teimum sosialu trupulleikunum og bart út tí rillandi grundarlagnum hjá unga ættarliðinum?

Hvar er frælsið, lívsmøguleikarnir og lívsdygdin hjá hesum?

Hesir trupulleikarnir finnast ikki innan fyri sjónarringin hjá afturhaldskreftunum!

Hetta eru trupullleikar sum ikki eitt tað einasta land við afturhaldsstýri av konservativum ella liberalum slag roynir at bøta um, uttan eftir hørðum trýsti frá eini framburðssinnaðari og sosialt sannførdari sosialistiskari andstøðu, umboðandi arbeiðararørsluna!

Hetta vísir gongdin alla staðni!

Men hesum lata tit eyguni aftur fyri!

Tit royna at sæta tykkum og tykkara!

At koma við eini slíkari yvirlýsing sum tykkara, er at kasta blak í eygu fólksins!

Men hvat var annað at vænta?

Einki!

dem-sos

Stórur demagogur — lítil psykologur

Í Dagblaðnum siggja vit, at Ó.B. rættiliga hevur fingið eitt herindi av politiskari búkillsku, orsakað av nýggja javnaðarlistanum í Sandoyar valdømi, og nýtir hann tí mikla blaðrúmd til »kritiska analysu« av sjálvum valevnunum.

Í politiskt tronga hugaheimi hansara, er sjálvandi ikki stórvegis skopbrá fyri broytingum ella frábregi. Hann hoyrir jú til teirra sum í rama álvara hava ta áskoðan, at bert eitt »ávist vánaligt slag« og eitt fátal av fólki fær verið javnaðarfólk. Og hetta hóast hann sum søgukønur akademikari átti at vita, at umleið helmingurin av øllum íbúgvum í Vestureuropa eru demokratiskir sosialistar, undir einum ella øðrum heiti. Fyri at Ó.B. tó ikki reiðiliga skal fáa hol á rukkulakkan, skal eg lata vera við at nevna, hvat brátt fer at henda við politisku støðuni í Ísrael.

Av hesum sama trongskygni fær hann tað her í verðini ikki at bera til, at tveir dugandi skiparar eru á áðurnevnda lista. Millum reglurnar kann ein hóma, hvussu hann hevur hóreiggja sær uppi á Traðarvegi, fyri tó at kunna siga okkurt útspillandi um hesar menn, men tað lá líkasum ikki fyri, og kvaldist tí í berum møsni.

J.B.M.

Viðgerðin av J.B.M. er heldur ikki serliga væleydnað. Tað tykist, sum at tað mest niðursetandi, Ó.B. kann finna uppá at siga um mannin, er at hann er statsins tænastumaður í oynni. Og skal tað í sjálvum sær vera niðursetandi — tá raka runubløk O.B. sum vanligt — mest hann sjálvan. Og í hesum føri enn verri — hansara heimfarnu ættfedrar.

Eg fari neyvan heilt skeivur, tá eg giti, at báðir abbar hansara vóru kongsins tænastumenn. Annar sýslumaður í Vestmanna og hin politistur í Havn — og annars heiðursmenn, báðir tveir.

Tórálvur M. Olsen

Analysan av politiska starvsfelaga sínum T.M.O. er so innantóm og høpisleys, at ikki er vert at taka upp á tungu. Alt hansara møsn um úlvaskinn og seyðaull kundi borið boð um, at hann sjálvur rættiliga er dreivaður — hevur fingið politiska lesull um beinini.

Um ikki vit vistu, at henda »ritgerð« var skrivað av framkomnum politikara, sum enntá situr í eini lyklastøðu í donskum politikki — tá høvdu vit gitt, at hon var skrivað av manni við seyðarhøvdi og úlvahala.

Í øllum førum avdúkar Ó.B!, at **hann** í hvussu so er, enn einki hevur lært í lívsins skúla.

Mølamenn

Eyðstein, og mølamenn annars, fáa frá Ó.B. eina serliga »heiðurs viðgerð«. Hann roynir at tilleggja teimum ymis meir og minni løgin eyðkenni, men

Framhald á síðu 12

Tø[illegible]il hotel Torshavn

Hvønn [illegible] hotel Torshav[illegible]-hanna-havn he[illegible] ikki fyrr enn [illegible], tá sjúkan [illegible] og tú noyðist a[illegible]ær niður fyri heilsu[illegible].

Tá nús[illegible]skilur ein, hvussu got[illegible]etta tiltak er, og ein dugir illa at fata, hvussu fólk hava klárað seg, áðrenn hetta frálíka hotel kom.

Hetta skal tí vera ein tøkk til hotellið og fram um alt ein tøkk til fyristøðukvinnuna Jonny og mann hennara Andreas. Tey eru sum skapt til hetta starv, og útbúgving teirra er eisini væl hóskandi. Blíð og hjálpsom eru tey bæði, og fyri mær sær tað út, sum um tey gera nógv meira, enn ein kann krevja av einum fyristøðupari. Altíð við tí góða orðinum, altíð til reiðar at veita troyst og hjálp. Hetta er týdningarmikið. Eingin, sum ikki hevur roynt hetta at sita einsamallur burturi í fremmandum landi við álvarsamari sjúku, kann til fullnar meta um, hvussu gott tað er, at vit hava júst tey bæði Jonny og Andreas at standa fyri Hotel Torshavn.

Vit eru mong, sum vóna, at tey fáa stuðul og uppbakking frá okkara myndugleikum í teirra dagliga virki, tí tað hava tey bæði so hjartaliga uppiborið.

Sjúklingar